# Fleiri landsdystir, takk

Brian Kerr sá annan páskadag tveir av trimum dystum, sum vórðu spældir, tí hann var fyrst í Gundadali og hugdi at B36-B68, áðrenn hann fór út á Argir at hyggja at AB-B71.

– Har komu nógv mál og undirhaldið var gott, men hetta var ikki fótbóltur á høgum stigi. Fleiri av spælarunum hava millum annað vánaligar fyrstu-røringar við bóltinum. Eisini vóru fleiri av málinum verjuvillir, umfram at veðrið gjørdi tað torført at spæla, er eygleiðingin hjá Brian Kerr.

Hann hevur eisini hug at ilskast inn á fleiri av vøllunum í Føroyum.

– Eg kundi hugsað mær, at fleiri vøllir vóru sum tann í Gundadali. Undirlagið er tað rætta og støddin á vøllinum líkist meira teimum, vit skulu spæla á. Av tí at fleiri vøllir eru ov smáir, brúka spælararnir ikki so nógva orku til at dekka allan vøllin, og tað er ein trupulleiki, sigur landsliðsvenjarin, ið kundi hugsað sær fleiri venjingardystir til landsliðið í summar.

– Millum annað kundi eg hugsað mær ein dyst í juni mánaði, so eg kundi sæð meira til spælararnar, men eg veit ikki, um tað figgjarliga letur seg gera, sum støðan er hjá Fótbóltssambandinum nú, sigur Brian Kerr, ið heldur Føroyar vera í einum torførum EM-bólki, so leikluturin verður at stríðast og so vóna, at okkurt stig kemur burturúr.

*trondur@sosialurin.fo*




*Kvinnulandsliðið hevur fýra ferðir verið við í Challenge Trophy-kappingunum, og allar fýra ferðirnar er tað endað við øðrum plássi*

# Altíð næstbestar

**CHALLENGE TROPHY Einki røkist fyri, at føroysku hondbóltskvinnurnar koma úr marruni í Challenge Trophy-kappingini, har tær fyri fjórðu ferð á rað gjørdust nummar tvey**

**Hilmar Jan Hansen**

Hesa ferð vóru Føroyar í bólki saman við Estlandi, Finnlandi og Moldova, og kappingin var í estiska býnum, Viimsi, sum liggur ikki so langt uttan fyri høvuðsstaðin, Tallinn.

Estland var eisini fyrsta mótstøðuliðið, og her gjørdist talan beinanvegin um ein sannførandi føroyskan sigur, tí Føroyar vunnu 34-15. Her skal so sigast, at talan var um eitt estiskt landslið, ið fyri tað nógva var mannað við U21-spælarum, so tí gjørdist munurin kanska so stórur í dystinum langafríggjadag.

Sama dag spældu Finnland og Moldova javnt, 25-25, sum var eitt sera óvæntað úrslit, tí Finnland skuldi verið munandi sterkari. Hetta var kanska eisini eitt úrslit, ið ikki segði alt, tí tá føroysku kvinnurnar páskaaftan spældu lykladystin í bólkinum ímóti teimum finsku, bleiv talan um avsmurning.

Tað vísti seg, at finska liðið var væl fyrireikað og í øllum førum spældi betur, enn javnleikurin ímóti Moldova kundi bent á. Finnland vann 27-16, og serliga var tað í seinna hálvleiki, at føroysku kvinnurnar komu í trupulleikar, tí bara tvey mál vóru á muni í hálvleikssteðginum.

Úrslitið merkti, at bólkurin mestsum var avgjørdur undan seinasta dystinum, sum var páskadag ímóti Moldova. Føroyar vunnu greitt 37-23, men tað bleiv kortini ikki nóg mikið, tí samstundis vann Finnland 25-12 á Estlandi og yvirhálaði Føroyar við einum stigi.

Tað merkir so eisini, at tað verða Finnland og Ísrael, ið vann hin bólkin, sum sleppa at spæla finaluna í Keypmannahavn, tá Danmark og Norra í desember mánaði eru vertir fyri EM-endaspælinum.

*einslistir@kallnet.fo*

## Tríggjar útvaldar

Sum vanligt hevur verið, hvørja ferð kvinnulandsliðið hevur verið við til Challenge Trophy-kappingarnar, endaðu fleiri av føroysku spælarunum á sokallaða All Star-liðnum, sum bleiv valt eftir kappingina.

Hesa ferð gjørdust tær tríggjar í tali, tí Simona Petersen – sum á ferðini í Estlandi spældi sínar fyrstu landsdystir fyri Føroyar, síðani hon hevur fingið føroyskan tjóðskap – gjørdist besti vinstri bakkur, Durita Ljósstein gjørdist besti verjuspælari og Unn Kragesten var kosin besti vinstri vongur í kappingini.

**hil**

## FAKTA

**Føroyar-Estland 34-15** (14-6)
Durita Christophersen 7, Simona Petersen 7, Heidi Joensen 4, Unn Kragesteen 4, Súsanna Petersen 4, Liljan Durhuus 3, Nina K. Johansen 2, Judith Hansen 1, Durita Ljósstein 1, Durita Mikkelsen 1

**Føroyar-Finnland 16-27** (8-10)
Simona Petersen 6, Durita Ljósstein 4, Una Olsen 2, Durita Christophersen 1, Liljan Durhuus 1, Nina K. Johansen 1, Unn Kragesteen 1

**Føroyar-Moldova 37-23** (15-12)
Durita Christophersen 7, Durita Ljósstein 6, Simona Petersen 6, Nina K. Johansen 5, Una Olsen 5, Liljan Durhuus 4, Agnas Olsen 2, Judith Hansen 1, Unn Kragesteen 1